# Indianarahøvdingi tosar

**Hetta er ein einastandandi frásøgn hjá einum indianskum høvdinga í Kanada. Í dag livir hann, sum indianarar liva í dag, í einum framkomnum samfelag. Men hann kann greiða okkum frá síni upprunamentan, sum vit onnur lítið og einki vita um**

FERÐAFRÁSØGN
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*



*Jytte og Anfinn framman fyri teirra hús í Kitimat*

Tveir av teimum nógvu føroyingum, sum hava verið góð umboð fyri Føroyar úti í heimi, eru hjúnini Jytte, ættað úr Kollafirði, og Anfinn Mikkelsen, ættaður úr Lorvík, men við foreldrum úr Gøtu.

Fyrstu ferð eg kom í samband við ættina var í 1994, tá ið eg luttók í einum altjóða fiskivinnufundi í Kanada. Tá vísti tað seg, at eg var fermenningur við eitt av canadisku umboðunum, og vit vóru ættaðir úr sama túni í Norðragøtu. So lítil kann verðin vera. Hetta var Jón sonur teirra. Jytte og Annfinnur komu sum ung til Kanada, har tey búsettust í Kitimat, sum liggur á vesturstrondini á Kanada nakað mitt ímillum markið til USA og Alaska. Her kom Anfinn at arbeiða sum verkfrøðingur á eini aluminiumsverksmiðju, har hann gjørdist ein av fremstu leiðarunum.

Vit komu at hava samskifti okkara millum, og í 2003 lá tað so væl fyri, at eg kundi fara at vitja Jytte og Anfinn í Kitimat í einar tveir dagar. Hetta var ein minnilig vitjan, har Annfinn nýtti tíðina væl og virðiliga at vísa mær økið. Millum annað vóru vit í fiskivinnubýnum Prince Rupert. Tað vóru fleiri áhugaverdar frásagnir í FF-blaðnum frá hesi ferðini.

Tað mest forkunnuga var tó møguleikin at kunna seg um indianska umhvørvið í hesum øki. Her vóru vit á vitjan í Kitamaat, sum lá hinumegin fjørðin. Frástøðan var einar 10-15 km. Annfinn hevði dugað væl at fáa sær samband við indiansku upprunafólkini, og hetta kom eisini mær til góðar á hesi ferðini.

Bert í British Columbia, vestasta landspartinum í Kanada, búgva 54 indianarastammur og nógvar tosa hvør sítt mál. Indianararnir eru nú savnaðir í serligar eindir, og Kitamaat er ein teirra. Her búgva 2-3.000 fólk, og nógv verður gjørt fyri at varðveita teirra serligu eyðkenni. Í býnum búgva tvær stammur, hvørs mál eru so ymisk sum danskt og føroyskt. Men knípur verður farið til enskt, sum øll duga. Hetta skapar so eisini tann trupulleika, at yngru ættarliðini tíma illa at læra seg fedranna mál, tá ið tey klára seg eins væl uttan. Ein annar trupulleiki er eisini, at einki skriftmál er enn, men arbeitt verður við tí.

Indianararnir hava ymisk rættindini fram um "hvítu" fólkini, millum annað tá talan er um veiðurrættindi.

Vit fingu høvi til at vitja ein kendan indianskan listarmann Sammy Robertson. Hann er so víðagitin, at kundar koma við privarflogfari at keypa hansara list. Hann er føddur í Kitamat og hevur dugað væl at sita undir, tá ið tey gomlu hava greitt frá. Hann før tí undir at umskapa gamlar sagnir til list. Hetta dugur hann væl sum onkur av myndunum í hesi grein eisini vísir.

Anfinn letur annars væl at indianarunum sum arbeiðsfólk. Varð víst teimum álit, vísti tey álit aftur. Jón, sonur Anfinn, segði, at teir ofta eisini høvdu serligt hegni at fáast við teldur.

### Vitjan hjá indianarahøvdingi

Í Kitamaat hittu vit báðir Anfinn eisini ein av teimum leiðandi hjá indianarunum, tann um 80 ára gamla James Robertson. Hansara heiti millum hansara fólk er "the elder" og kann í okkara málnýtslu týðast til høvding. Hetta er eitt heiti, sum er arvað, og sum tí ikki gevur beinleiðis vald. Men tað skapar virðing og tign, og her er talan um mann við nógvum og drúgvum lívsroyndum. Og at James føldi ábyrgd sæst av, at hann javnan tók til "my people", "mítt fólk," táið hann greiddi frá.

Tað var eitt serligt upplivilsi at práta við ein slíkan persón, hvørs uppruni er so sera nógv øðrvísi enn okkara.

Tað fyrsta sum James gjørdi, var at vísa okkum sína indianaradrakt. Tað týdningarmesta er, hvussu hon sær út aftani frá. Her er mynd av mastrahvali (killer whale), og hetta merkir, at James hoyrir til "mastrahval–klanina" í indianarasamanhangi. Framman fyri á draktini var eitt tekn, sum vísti, hvussu maðurin eitur.

Indianaranavnið hjá James er "Wachmaldam", sum merkir: " Maðurin, ið hevur virðing fyri djórunum, og sum hevur evni til at samskifta vit tey," og tað var júst hetta sum var tað mest sermerkta við James.

Frammanfyri á draktini var eisini tekn, sum ímyndaði ein frosk, og vísti hetta, at fyri indianararnar var froskurin eitt týdningarmikið djór, sum eisini kundi hjálpa teimum at verja teir móti komandi vandum.

James Robertson er av Kitlope ættarfólkinum. Staðið liggur í botninum á einum fjørði einar 60 fjørðingar sunnanfyri Kitimat. Tey vóru eini 200 fólk, sum búðu her. Men fyri umleið 50 árum síðani, varð ættin flutt til Kitimat, har "Haisla" ein onnur indianaraætt býr. Orsøkin til flytingina man hava verið tann sama, sum í Grønlandi. Landið er so stórt, at tað ber illa til at hava nøkur fá fólk búgvandi so oyðið, sum her var talan um.

Tískil hava hesar "Haisla" og "Kitlope" ættirnar búð saman í nógv ár. Fólkið skilir hvørt annað, og ger hetta samskiftið millum ættirnar so mikið lættari.

### Kitlope umhvørvið

Fyrst er at siga, at indianarar hava búð á hesum økjum í eini 8-12.000 ár, so tað er ikki av ongum, at almenna heitið á indianarum í Kanada er "First Nation People".

Kitlope skógarøkið er rættuliga stórt, umleið 3.000 ferkilometrar ella gott tvær ferðir allar Føroyar. Økið er náttúruvakurt við millum øðrum stórum fossum og tí 10 km langa Kitlope vatninum, har tað er ein hópur av kópi og ríkum djóra- og plantulívi. Men serliga er nógvur skógur her, og hildið verður, at trøini eru upp til 800 ára gomul.

Økið er mett av náttúrufrøðingum at vera tann størsta urskógin av hesum slag í heiminum, sum framvegis er varðveitt óspilt av mannahond. Tískil er hetta økið sera virðismikið fyri náttúrufrøðingar úr ymsum londum, sum koma higar at granska djóra- og plantulívið. Vegna serligu umstøðurnar, kunnu tær stóru grizzly bjarnirnar liva her. Tað hevur seinastu árini verið roynt í samstarvi við UNESCO at fáa økið friðað sum náttúrupark, sum skal varðveitast ónomið. Tískil er økið eitt sera væl umtókt mál fyri ferðafólk, har tey kunnu síggja hesa stórslignu, óspiltu náttúruna.

At tað eydnaðist fáa fáa Kilope friðað, er ein áhugaverd søga. Ein av teimum stóru timburfyritøkunum í Kanada, West Fraser, hevði fingið loyvi frá myndugleikunum til at fáa sær timburvinnu í økinum. Hetta er ein vinna, sum er sera oyðandi fyri umhvørvið. Tískil før ein rørsla í gongd, hetta var í 1980-unum, sum vildi varðveita økið órørt. Tað sjáldsama hendi, at fyritøkan sjálvboðin segði rættin frá sær til virksemi og tað enntá


*Sammy Robertson við einum totempela, hann hevur teglt*